## Brasil verður heimsmeistari

Venjarin hjá enska meistaraliðnum roknar við, at Brasil verður heimsmeistari næsta summar. Skotin Alex Ferguson heldur ikki, at Ongland fer at megna at vinna HM. - Eg dugi ikki at ímynda mær nakað annað, enn at Brasil verður heimsmeistari. Tú skalt hugsa um, hvussu nógvar góðar spælarar, teir hava, sum teir kunnu seta inn. Í fjør vóru tað bert 15 eingilsmenn í Champions League, men 103 brasilumenn, sigur Alex Ferguson við Skysports.




## Chelsea veitraði við 500 mió

Fleiri feløg royndu í summar at keypa franska stórspælaran Franck Ribery frá Bayern, men tað eydnaðist ikki. Eitt av boðunum kom frá Chelsea, avdúkar stjórin í felagnum.
- Besta boðið, vit fingu, var frá Chelsea, sum bjóðaði okkum 500 milliónir krónur fyri Ribery. Harafturat skuldu vit eisini fáa Bosingwa í býti, sigur Uli Hoeness. Bayern keypti í 2007 Ribery frá franska felagnum Marseille.

### VB-Stjørnan 17-24 (8-13):

# Lætt hjá Stjørnuni

**Stjørnan kom sær ikki í nakrar óneyðugar trupulleikar, tá tær fóru úr VB-høllini við báðum stigunum**




Jákup Mørk

Tað var botnurin sum tók ímóti toppinum í Vági sunnudagin. Og tað endurspeglaðist eisini á máltalvuni.

Hóast VB fyrstu longu løtuna fylgdi væl við gestunum, so var sjáldan nakar ivi um, at Stjørnan hevði nógv meira at geva av, og seinastu løtuna undan steðginum settu tær eisini tingini upp á pláss.

Stjørnan vann sær tá eina trygga leiðslu, og hesa heldur tær rimmar fast um gjøgnum allan seinna hálvleik.

Sigurin ber við sær, at Stjørnan framvegis eltir Tjaldur, sum tó er tvey stig frammanfyri. VB er framvegis stigaleyst í botninum á stigatalvuni, men tað er helst ikki stórvegis ivi um, at tað er í øðrum uppgerðum enn júst móti oddaliðunum, at tær skulu vinna sær neyðugu stigini.

### VÍF-StÍF 24-25 (13-15):

# VÍF slapp ikki úr saksinum

**Alt bendi á sigur til VÍF, men í seinastu løtu eydnaðist tað StÍF at toga stigini við sær, soleiðis at tær ikki longur eru partur av niðurflytingarstríðnum**




Jákup Mørk




StÍF dróg longra stráðið í tøttu uppgerðini í Vestmanna, og nú tykist botnstríðið einvíst at standa millum VÍF og VB

Mynd: Álvur Haraldsen

Kvinnurnar hjá VÍF høvdu allar møguleikar at skræða seg heilt leysar úr botninum. Átta minuttir fyri dystarlok skoraðu tær til 24-22, og bara ein minutt seinni kundu tær við brotskasti punktera dystin.

Liljan Djurhuus hevði fýra ferðir undan hesum sent brotskast í netið, men fimtu ferð riggaði ikki. Brotskastið varð misnýtt, og eftir hetta vóru tær á heimaliðnum púrasta sørar. Trý mál komu afturat í dystinum, men tað vóru gestirnir, sum fingu øll av hesum, og so kundi StÍF økja sítt stigatal upp í seks, soleiðis at tær meira ella minni hava veitrað farvæl til botnstríðið.

Tað hevur VÍF hinvegin als ikki gjørt. Tey bæði stigini, sum tær vunnu á heimavølli móti VB, eru framvegis tey bæði einastu, sum liðið hevur vunnið, og tí verður talan av sonnum um gysara, tá farið verður til Vágs tann 13. oktober.

### Neistin-Tjaldur 19-28 (10-14):

# Finaluspurningurin avgreiddur

**Enn er kappingin ikki komin hálva leið, men eftir greiða sigurin hjá Tjaldri á Neistanum mugu finalusessirnir hjá Tjaldri og Stjørnuni metast sum avgreiðsluspurningar**




Jákup Mørk

Skuldi Neistin spæla við í dystinum um finalupláss, so var kravið treytaleyst ein sigur á Tjaldri, sum als ikki hevur mist stig í ár.

Men tað var í veruleikanum langt frá, at Neistin kom í nær námind sigrinum. Fyrstu løtuna hildu tær fast í mótstøðuni, men tá Tjaldur fekk sítt spæl og sína verju at hanga saman, var ikki stórvegis, sum Neistin fekk gjørt.

Í verjuspælinum gekk annars hampuliga væl hjá Neistanum stóran part av dystinum, men í álopinum vildi lítið og einki bera til. Ofta vóru álop endað óneyðuga skjótt, og tað var ongan tíð soleiðis, at nakar serligur friður fekst yvir spælið hjá heimaliðnum.

Kanska koyrdi álopið hjá Tjaldri heldur ikki so væl. Men tær hava besta skjúttan í landinum, og tá einki annað riggar, so kann Adina Petrea altíð langað nakrar bóltar í kassan av tríggja-metra strikuni.

Sigurin ber við sær, at Tjaldur framvegis hevur fult stigatal í toppinum á stigatalvuni. Neistin er hinvegin longu nú endað í einum ongamannalandi, har liðið helst vinnur sær bronsumerki, men har tær samstundis neyvan hava møguleika at vinna seg longur upp enn tað sama.



**Neistin hevði ikki nóg nógv at bjóða uppá móti Tjaldri, og tí er finaluspurningurin nú mest sum avgreiddur**

Mynd: Álvur Haraldsen